# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Ásmundur Poulsen 75 ár

Í dag, mikudagin 22. februar 2006 fyllir Ásmundur Poulsen í Havn 75 ár.

Ásmundur er føddur á Eiði í 1931. Umframt at hann arbeiddi sum telefonmaður á Telefonverkinum í 27 ár, byrjaði hann í 50´unum at fotografera, og hetta vant uppá seg, til foto bleiv hansara yrkisvegur. Hann fór at geva út postkort við myndum av føroyskari náttúru, og síðani fór hann eisini at geva út myndabøkurnar „Føroyar í myndum“ við teksti hjá Hans Thomsen.

Harumframt fotograferaði hann í samband við øll møgulig høvi, brúdleyp, skipsdópar, almennar vitjanir osfr. Hansara myndir hava verið at sæð nógvastaðni



sum t.d. í Atlantic Review og National Geografic.

Ásmundur tók myndir til bókina „Blandt frender på Færøyene“, eins og hann tók fotomyndirnar til bókina „Føroysk list“, sum Emil Thomsen gav út við teksti hjá Williami Heinesen. Hann og Eyvindur Mohr leveraðu myndir til tey fyrstu føroysku frímerkini.

Sum fotografur er Ásmundur Poulsen sjálvlærdur. Hann hevur verið kring oyggjarnar mangar gangir við sínum Hasselblad myndatólið. Hann hevur eitt serligt myndaeygga og ein serligan áhuga fyri føroysku náttúruni, sum hann hevur fotograferað gjøgnum sløk fimti ár. Umframt føroyamyndirnar, sum eru kendar frá vøkrum postkortum og myndabókum, hevur Ásmundur Poulsen gjørt fleiri áhugaverdar portrettmyndir, ið tykjast meira eksperimenterandi í stílinum, har hann m.a. arbeiðir við ekspressivum ljós- og skuggaárini.

Foreldrini hjá Ásmundi vóru Thomina, f. Andreassen, og Hans Jacob Poulsen, bæði av Eiði.

Í 1952 giftist hann Esther, f. Poulsen, úr Djónastovu á Eiði, Tey fingu tríggjar døtur: Berghild, Halldis og Kinnu. Abbabørnini eru trýí tali, og langabbabørnini eru fýra.

Ásmundur og familjan hava síðan sekstiárini búð í húsunum uppi á Lützenstrøð í Havn, og har býr Esther enn. Ásmundur býr á Heiminum í Vallalíð, har føðingardagurin verður hildin.

✝

## Andlát og jarðarferðir

**Jakku Hansen, vanliga nevndur skómakarin við Gøtugjógv**, fer til gravar úr Filadelfia í Gøtu, hósdagin, 23. februar, kl. 13. Tey, ið vilja minnast Jakku, kunnu lata Zarepta eina peningagávu.

**Petra Næs Joensen, Tórshavn**, andaðist í heiminum leygardagin, 18. februar, 97 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Hvnarkirkju mikudagin, 22. februar, kl. 13.

**Boe Hansen, ættaður av Amager, búsitandi í Sørvági**, andaðist sunnudagin 19. februar, 78 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Sørvágs Kirkju mikudagin kl. 14. Sungið verður úr sálmabókini. Tey, ið vilja minnast Boe, kunnu lata eina peningagávu til Sørvágs Kirkju; konta í Føroya Sparikassa.



Altíð tað nýggjasta

www. sosialurin.fo

## Til vinin Hera



Tað var við djúpari sorg, at vit fingu boðini um deyða Hera Niclassen, stjóra í Ferðaráði Føroya.

Heri var høgt mettur og virdur í allari ferðavinnuni, og alskur hansara til føðilandið, gjørdi hann til besta sendiharra Føroya. Fyri okkum var hann av sonnum "Harra Føroyar", og fara vit at sakna hann ómetaliga nógv.

Heri var høvuðssamstarvsfelagið okkara, tá Smyril Line á sinni tók upp handilssamband við Hetland. Vinir og felagar virðismeta dugnaskap og miðvísa arbeiðið hansara at fáa samstarvið at eydnast væl, tá, fyrst í áttatiárunum. Í vertskapi og í arbeiðshøpi var Heri ein serstakliga væl lýddur og umhildin persónur, og av sonnum ein álitismaður, sum vit kundu líta á, óansæð um talan var um kunning ella góð ráð.

Lívlangi trúskapurin móti ferðavinnuni var styrkin hjá Hera, sum gjørdi hann so høgt virdan av øllum, sum kendu hann. Hetlendska ferðavinnan er takksom fyri megnartak hansara at lata upp Skandinaviska marknaðin fyri Hetlandi, og lat hetta seg einans gera, tí vitan og innlit hansara í ferðavinnuna var uttan samanbering.

Tað hevur verið mær ein heiður og æra at vera vinur Hera, og eg fegnist um góð minni um hann. Í hesi sváru tíð, vísi eg djúpa samkenslu við familju, vinum og starvsfólkum á Ferðaráðnum.

**Vinaliga**
**Maurice Mullay**
**Ex Chief Executive,**
**Shetland Island Tourism**
**Einarberg**
**Gulberwick**
**Shetland**



Almenn móttøka
á Landssjúkrahúsinum

Almenn móttøka verður í nýggju forhøllini
á Landssjúkrahúsinum
hósdagin 23. februar 2006 kl. 14 - 16
í sambandi við at gamli høvuðsbygningurin
og nýbygningurin eru liðugt samanbygdir
og nýggj høvuðsinngongd verður tikin í brúk.

Landssjúkrahúsið



Tín stóri dagur

Takka í Sosialinum